# Tað er framvegis stuttligt

**Fyri aðru ferð er Bjarni Johansen partur av einum ættarliðsskifti í VB, men hesaferð er tað í eldra endanum, at drúgvi málverjin stendur**

Jákup Mørk

Meistaraheitið hjá VB í 2000 var avgjørda hæddarpunktið hjá einum av mestu evnaríku ættarliðunum, sum VB hevur havt. Sæð burtur frá útlendska kryddinum og einstøkum yngru kreftum, so her talan um leikarar, sum ígjøgnum eitt tíggju-ára skeið ella meira høvdu verið fastur partur av VB. Eitt lið, sum fyrstu árini hevði tað ógvuliga trupult, og okkurt árið var í aðru deild, men sum síðani gjørdi alt meira um seg.

## Bert tveir eftir

Í dag er meginparturin av hesum liðnum burturi. Eitt nýtt ættarlið er um at taka við, men hóast stóra útskifting, so er enn onkur av teimum gomlu, sum framvegis heldur fast um pláss sítt.

Annar av hesum er Bjarni Johansen, sum síðani 1988 hevur verið fastur fúsur millum stengurnar. Saman við 35 ára gamla Eyðuni Jacobsen er hann einasti av teimum heilt royndu, sum framvegis eru á liðnum, men hóast stóra skiftið, so tykist hetta so avgjørt ikki at nerva málverjan.

– Ja, hetta er eitt sindur løgið. Nú er tað líka við, at eg eri elsti leikarin á liðnum, men sjálvur haldi eg, at tað framvegis er líka stuttligt fyri tað. Ungu leikararnir á liðnum eru ótrúliga seriøsir. Teir eru vanir við at vinna, og hava tí rætta hugburðin í so máta. Fleiri teirra hava eisini verið á ymsum landsliðum, og tí vita teir eisini, at tað krevur hart arbeiði, um alt skal rigga, soleiðis sum vit vilja hava tað at gera.

Við nýggja aldursbýtinum á liðnum, er eisini eyðsæð, at leiklutturin hjá royndu leikarnum gerst øðrvísi. Ikki minst uttanfyri vøllin, men hetta tykist tó ikki vera nakað, sum nervar Bjarna Johansen.

– Tað er kanska meira so, at ein størri ábyrgd nú er løgd á okkum. Vit eldru skulu jú vera stuðlarnir, sum teir ungu kunnu styðja sær at, og ikki minst haldi eg eisini, at vit eiga at koma við góðum ráðum. Konstruktivum kritikki, soleiðis at vit kanska kunnu vera við til at betra um avrikini hjá einstøku leikarunum, og harvið eisini liðnum, heldur hann.

## Verður meira glíðandi framyvir

Sum nevnt omanfyri, so tók tað sína tíð, áðrenn seinasta ættarliðsskiftið hjá VB gav úrslit. Niðurflyting var veruleiki ta einu ferðina, og annars var liðið fleiri ferðir í tyngra endanum, áðrenn úrslitini av álvara komu.

Men málverjin tykist als ikki óttast, at sama fyribrigdi skal gera seg galdandi hesaferð.

– Sjálvandi er hetta nakað, sum tekur tíð at bygga uppaftur, men eg rokni ikki við, at hetta verður eins tungt hesaferð. Nú eru eisini nakrir sterkir útlendingar á liðnum, umframt okkum gomlu, sum enn er við, so møguleikarnir eru munandi betri í so máta. VB er eisini eitt øðrvísi felag í dag, har tað mest sum í hvørjum árgangi eru leikarar, sum kunnu røkka langt, og hetta ger helst, at skiftið í framtíðini fer at verða nógv meira glíðandi í mun til fyrr, tá tað bert vóru einstakir árgangir, har fleiri komu upp. Hetta er heilt avgjørt eitt úrslit av stóra ungdómsarbeiðinum, sum hevur verið gjørt seinnu árini, og tað er avgjørt nakað, sum fer at gera felagið nógv sterkari framyvir.

– Men fyri fyrst hava vit so ikki sett okkum tey heilt stóru málini. Árið í fjør var einki serligt, og kanska hevur hetta trýst meira á ættarliðsskiftið, og fyri fyrst ætla vit okkum bara at gera tað betri, enn vit gjørdu í fjør. So mugu vit síggja, hvussu nógv vit kunnu vaksa sum lið komandi árini, heldur hann.

## Skal spælast av

Hóast drúgvu royndirnar, so er Bjarni við sínum 32 árum ikki nakar aldursforseti í føroyskum fótbólti. Hetta er heldur ikki nakar serliga høgur aldur fyri ein málverja, og Bjarni sigur eisini, at enn hevur hann so ikki nakrar ætlanir um at gevast við fótbóltinum.

– Tað veldst eisini um, hvussu gongst hjá yngru málverjunum. Har eru í øllum førum nakrir, sum kunnu koma langt, so hatta verður kanska ein spurningur, sum kann loysast av sær sjálvum. Eg rokni í øllum førum ikki við, at eg eina ferð í framtíðini fari at standa sum ein forðing fyri, at ein ungur evnaríkur málverji skal fáa møguleikan, men tað er so ikki nakað, sum eg havi tikið støðu til enn.



*– Vit eldru skulu jú vera stuðlarnir, sum teir ungu kunnu styðja sær at, og ikki minst haldi eg eisini, at vit eiga at koma við góðum ráðum. Konstruktivum kritikki, soleiðis at vit kanska kunnu vera við til at betra um avrikini hjá einstøku leikarunum, og harvið eisini liðnum, heldur Bjarni Johansen.*

Mynd: Álvur Haraldsen






